# Glömdagen

("Gloymidagurin")
Rithøvundur og myndprýðari: Sara Lundberg (Svøríki)
Mirando Bok, 2021

Tilnevnd Barna-og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2023

Søgugongd: Nóa er boðin í veitslu, men hann og mamman hava gloymt at keypa eina gávu! Tá fáa tey skund, og mamman skundar undir Nóa. Nóa vil heldur sleppa heim enn út at keypa gávu og í veitslu. Hugsa tær, so nógv mann kann gloyma uppá ein dag – ein kasjett, ein jakka, eina føðingardagsgávu. Hvat mann henda við øllum tingunum, sum fólk gloyma og missa burtur? Hvør finnur tey?

Evni: kenslur, veitsla, familja, hugflog, gerandisdagur, skundur




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørji spennandi djór finna tit í leikuhandlinum? Hvør situr í bussinum? Hvør gongur í rullitrappuni í handilsmiðstøðini?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvønn halda tit, bókin snýr seg um? Hvat fáa tit at vita um tey, tit síggja á myndini?**

**2. Hyggið at myndini við leikum í leikuhandlinum. Hvørji djór goyma seg á hillunum? Hvussu siga tey?**

**3. Ein krúna er týdningarmikil í søguni. Gerið tykkara egnu krúnu.**

### MIÐLINGAR

**1. Kenna tit tykkum aftur í søguni? Hava tit onkuntíð gloymt okkurt? Tosið saman um at gloyma.**

**2. Hvussu kennist tað í kroppinum, tá mann hevur skund?**

**3. Nóa hevur ongan hug at fara í veitslu hjá Almu, tí hann spælir so sjáldan við hana. Hvat kann mann gera fyri at fáa gongd á at spæla við onkran, sum mann ikki kennir?**

**4. Á myndini, har Nóa og mamma ganga heim frá Almu, síggja vit skuggarnar hjá teimum á markini. Dugir tú at tekna tín egna skugga? Stilla teg framman fyri ljósið, so tú sært tín skugga týðiliga og tekna hann av. Tit kunnu eisini gera ein skuggaleik við at gera skuggamyndir við hondunum.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Farið á litveiðu saman. Síðurnar hava týðiligar litir. Hvørjar litir síggja tit? Finna tit lutir, har tit sita, sum hava sama lit?**

**2. Í bókini vitja tey ein handil, sum selur búnar og útgerð, t.d. eina krúnu. Roynið og klæðið tykkum út. Samlið saman ymisk klædnapløgg og útgerð. Gerið røddir og gangið sum tann persónurin, tit royna at líkjast. Tosið saman um, hvussu tað kendist at vera ein annar eina løtu?**

**3. Hvat heldur tú stendur á borðinum eina viku seinni, tá veitslan veruliga skal vera? Tekna veitsluborðið omanífrá við borðbúnaði, mati o.ø. á eitt stórt pappír.**

**4. Í endanum av bókini er ein søga í myndum. Arbeiðið í bólkum og forteljið í felag søguna um krúnuna.**

**5. Gloymidagurin byrjar soleiðis: "Vakna!", sigur mamma. Lat hetta vera byrjanina á eina heilt aðra søgu við einum heilt øðrum høvuðspersóni í einum heilt øðrum umhvørvi.**

**LES EISINI:**
**Dröm om drakar eftir Sanna Tahvanainen og Jenny Lucander**
**Jag och alla eftir Ylva Karlsson og Sara Lundberg**
**Olli och Mo eftir Eva Lindström**
**Abbi og eg og abbi eftir Dánial Hoydal og Annika Øyrabø**

## MÁLBITIN

# "Veitsla"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursámiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kalas** | **Fest** | **Fest** | **Veisla** | **Veitsla** | **Inuuissiortumik nalliuttorsiutiginninneq** | **Juhlat** | **Feasta** |



**Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!**